Lívdin
- í lívd hins hægsta

September 2008



# Høgni við í almennum kjaki við muslim



*Høgni Johannesen kjakast við ein muslim í miðbýnum í Birmingham*

Í september skal Høgni Johannesen, trúboðari í Birmingham, kjakast alment við ein tann fremsta muslimin í býnum. Kjakið verður í leikhøllini á einum bókasavni í miðbýnum í Birmingham.
Um Høgni vinnur kjakið við muslimin, fellur tað helst ikki í góða jørð hjá muslimunum, og tað kann hava við sær, at hann krevur at ansa betur eftir sær og familjuni.

Høgni hevur serkunnleika í trúarverju, sum er ein trúboðaratænasta, ið leggur dent á at verja trúvirði Bíbliunnar og kristindómsins ímóti álopum og próvgrundum frá t.d. gudsavnoktarum, bíbliuatfinnarum og muslimum.
Minnist til at biðja fyri Høgna og familjuni.

## Lívdin 7 ár

Sunnudagin 24. august varð hátíðarhildið, at sjey ár eru liðin, síðan samkoman Lívdin hevði sítt fyrsta møti, sum varð hildið í Verkhúsinum Virkni á Berjabrekku.



## Persónur og verk Heilaga Andans

Nú vit byrja røð okkara gjøgnum Ápostlasøguna, fari eg at heita á samkomuna um at lesa bókina aftur og aftur. Eitt av høvuðsevnunum í Ápostlasøguni er persónur og verk Heilaga Andans. Heilagi Andin er so ómetaliga langt oman fyri alt tað, sum vit gera Hann til. Her eru nøkur vers uttan fyri Ápostlasøguna, sum undirbyggja læruna um Heilaga Andan í Ápostlasøguni:

- Hann innsiglar tann trúgvandi við ævigari vón (2. Kor. 1:21–22).
- Hann gevur tí trúgvandi andaligar gávur og tænastur (1. Kor. 12:7, 11, 13).
- Hann kastar ljós á Skriftirnar fyri tann trúgvandi ( Jóh. 16:13).
- Hann er í støðugari bøn fyri teimum trúgvandi (Róm. 8:26–27).
- Hann ber varandi ávøkst í teimum trúgvandi (Gal. 5:22–23).
- Hann er komin at halda brúður Kristusar reina (2. Kor. 11:2).
- Hann er komin at leiða brúður Kristusar heim til brúðgómin (Ef. 5:25–27).

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Andrias C. Samuelsen til minnis

Mikudagin 13. aug. andaðist Andrias C. Samuelsen í Havn, 61 ára gamal. Andrias var havnarmaður. Hann lærdi í Sjóvinnubankanum og var bankamaður í nøkur ár. Hansara lívsstarv var á grannskoðaravirkinum hjá Jógvani Sundstein, sum í dag eitur Grannskoðaravirkið Inpact. Í eitt tíðarskeið, frá 1982 til 1992, búði familjan í Danmark, har Andrias m.a. las HD og arbeiddi hjá Fiskasøluni í Hirtshals.

Fyri umleið einum ári síðan gjørdist Andrias álvarsliga sjúkur, og nú vann sjúkan á honum.

Andrias var giftur Arnhild á Bergi úr Klaksvík, vanliga nevnd Aja. Tey eiga tvær døtur, Elisabeth og Ingu, og tríggjar ommu- og abbasynir. Vit minnast Andrias við takksemi.



## Nýggir leiðarar í Kristnastovu



*Øssur og Susan Berghamar og Dora og Niels Pauli Nónstein*

Mikukvøldið 13. august var eitt sonevnt kristnastovukvøld í Ebenezer í sambandi við, at hjúnini Dora og Niels Pauli Nónstein framyvir fara at mynda leiðsluna í Kristnastovu í Keypmannahavn. Tey hava tikið við eftir hjúnini Susan og Øssur Berghamar, sum hava staðið fyri arbeiðnum millum føroyingar í Kristnastovu í Keypmannahavn síðan 1973.

Susan og Øssur Berghamar verða tó framvegis knýtt at verkinum í Kristnastovu og halda fram við vitjanum t.d. á Ríkissjúkrahúsinum og Hotel Tórshavn.

## Tillukku við barninum

8. mai fingu Marta og Ingálvur Jøkladal í Keypmannahavn ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3880 gr.

8. juli fingu Guðrun og Hans Ove Johansen í Havn eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3950 gr.

28. juli fingu Beinta og Regin Hammer í Hoyvík ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3.700 gr.

12. aug. fingu Katrin og Gordon Rajani eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3.500 gr.

## Tillukku við hjúnabandinum

Leygardagin 2. august giftust í Sjóvar kirkju Alisa Hammer av Strondum og Ási Joensen úr Klaksvík. Veitslan varð hildin fyri innbodnum á Hotel Norð á Viðareiði.



Leygardagin 23. august giftust í Ebenezer í Havn Jeanette Ottosen úr Hoyvík og Solomon Magura úr Zimbabwe. Veitsan varð hildin fyri innbodnum á Gjárgarði við Gjógv.



# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og "bøn og bønarskúli" eru týskvøld kl. 20.**

2. sept.: Missiónskvøld (Abby og Ben Rasmussen)
9. sept.: Bønarløta
16. sept.: Húsbólkar (einki møti)
23. sept.: Leiðslan: Trin I: Hvat er og hvat ger Lívdin? / Bønarløta
30. sept.: Leiðslan: Trin II: Andalig búning / Bønarløta

## Stuðul til eitt barnaheim í Uganda



Ein nýggj tænasta er byrjað í Lívdini, sum Ilda Lómstein stendur fyri. Ein av uppgávunum hjá hesi tænastu er at stuðla Jajja's Home, sum er eitt barnaheim í Uganda fyri foreldraleys børn við HIV ella AIDS. Heimið gevur børnunum heiligvág, viðgerð, ráðgeving, andaliga vegleiðing og førleikamenning.
Lívdin hevur verið við til at stuðla barnaheiminum saman við Kristnastovu í 2007.

Sum støðan er í løtuni mangla enn 25.000 krónur fyri at náa málið fyri 2008.

Ilda Lómstein fer at greiða samkomuni frá ítøkiligu ætlanunum við at stuðla barnaheiminum í ár.

Áhuga kunnu eisini venda sær til Ildu á tel. 00298 545144. Ilda sigur, at øll eru vælkomin til at koma við uppskoti til eitt navn til hesa tænastu, ið m.a. hevur sum endamál at geva.

## OM Føroyar leigaði flogfar til TeenStreet




120 fólk úr Føroyum vóru við til ungdómstiltakið TeenStreet, sum byrjaði leygardagin 2. august í Oldenburg í Týsklandi. OM Føroyar leigaði eitt flogfar frá Atlantsflog til at flyta meginpartin av fólkinum til Týsklands.

Av teim 120 vóru um 90 luttakarar, hini vóru leiðarar og hjálparfólk. TeenStreet tiltakið hevur gjøgnum fleiri ár havt sera góða umboðan úr Føroyum. Umleið 70 fólk vóru úr Danmark hesaferð. Stevnan í Oldenburg var frá 2. til 9. august.

## Christmas Child tiltakið aftur í ár

Mikukvøldið 3. september var ein fundur um Christmas Child í hølunum hjá Lívdini á Brekku, har greitt varð frá felagsskapinum Samaritans Purse, sum skipar fyri átakinum.

Durita Djurholm vísti myndir og greiddi frá, tá tey sum familja vóru á Filipsoyggjunum á jólum í fjør og vóru við til at býta út skógvaeskjur. Eisini sýndi Ilda Lómstein ein leik um týdningin av at geva.

Pakkarnir til Christmas Child tiltakið í ár skulu vera inni í seinasta lagi 26. oktober 2008.



# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla




### Sunnudagin 7. september

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*<br>*Talari: Poul Guttesen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ápostlasøgan - Arbeiðið heldur fram í kraft Andans (Áp. 1)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 14. september

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni*<br>*Talari: Gunnar Nielsen* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ápostlasøgan:*<br>*Koma Heilaga Andans (2:1-13)*<br>*Talari: Poul Guttesen* |

### Sunnudagin 21. september

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Leikur um lív Paulusar (Annar leikur)*<br>*Fyriskiparar: Súsanna og Guttorm* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ápostlasøgan: Samkoman í Jerúsalem (2:42-47)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 28. september

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Tankar úr Ápostlasøguni* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ápostlasøgan: Síggja vit tørvirnar, gevur Gud møguleikarnar (3-4)*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*